# LISTASAVN FØROYA

## Ársfrágreiðing og roknskapur
## 2004

Listasavn Føroya - Gundadalsvegi 1 - Postsmogu 1141 - FO 110 Tórshavn - Føroyar
Telefon +298 313579 - Fax + 298 316679 - T-postur: info @ art.fo - www.art.fo

Juni – 05

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ..... 2
Ársfrágreiðing og roknskapur 2004 ..... 3
1.0 Alment ..... 3
1.1 Listasavn Føroya og framtíðin ..... 3
1.2 Savnið ..... 3
1.3 Skrásetingin ..... 4
1.4 Varðveitslan ..... 4
1.5 Gransking ..... 4
1.6 Kunning ..... 4
1.7 Framsýningar ..... 4
1.8 Marknaðarføring ..... 5
1.9 Heimasíðan ..... 5
1.10 Listasavnshandilin - kaffistovan - læna høli ..... 5
1.11 Trygdin ..... 5
1.12 Útlán / innlán ..... 5
1.13 Listaverk í varðveitslu ..... 5
1.14 Skjalagoymslan ..... 6
1.15 Bókasavnið ..... 6
1.16 Stuðul og fíggjarvánir ..... 6
Virkisgrundarlag og endamál ..... 7
2.1 Navnið á savninum ..... 7
2.2 Adressa, telefonnummar o.t. ..... 7
2.3 Savnsbygnaður ..... 7
2.4 Endamálið hjá Listasavni Føroya ..... 7
2.5 Samstarvsavtalur ..... 7
Innsavning, keyp og gávur ..... 8
3.1 Listasavnið ..... 8
3.2 Keypt, givin og latin í varðveitslu ..... 8
Keyp: ..... 8
Savnið, goymslan og bókasavnið ..... 9
4.1 Útlánt listaverk ..... 9
Varðveiting og skráseting ..... 10
5.1 Skráseting ..... 10
5.2 Konservering ..... 10
Kunning ..... 11
6.1 Fasta framsýningin ..... 11
Upplatingartíðir: ..... 11
6.2 Skiftandi framsýningar ..... 11
6.3 Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi ..... 11
Bygnaður, leiðsla og starvsfólk ..... 12
7.1 Stýrið ..... 12
7.2 Leiðslan ..... 12
7.3 Starvsfólk ..... 12
Leys hjálparfólk ..... 12
8.0 Fígging og roknskapur ..... 12
RAKSTRARROKNSKAPUR ..... 13
FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER ..... 14
FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER ..... 15
NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN ..... 16
Samanseting av tí almenna og sjálvseigandi ársroknskapunum 2004 ..... 17

# Ársfrágreiðing  og roknskapur 2004

## 1.0 Alment

Árið 2004 var merkt av skiftandi leiðslu á Listasavni Føroya (hereftir LF), sum sjálvandi førdi við sær darvan av virkseminum á ymiskum økjum. Tó hevur eydnast væl at hava eina breiða framsýningarskrá gjøgnum árið. Tilsamans hava verið átta framsýningar, sum allar hava hepnast væl og vórðu væl vitjaðar.

Tann almenni fíggjarligi karmurin hjá Listasavni Føroya er og hevur í mong ár verið sera trongur við hækkaðum útreiðslum við tí úrsliti, at tað skerjir møguleikarnar hjá LF á mongum økjum, t.e. at fáa fremmandar framsýningar higar, sum eru við til at stimra føroyska listaheimin. Eisini hava møguleikarnir at keypa føroyska nútíðarlist verið skerdir av somu orsøk. Tí er neyðugt hjá LF at leggja áherðslu á at fáa til vega alternativa fígging. Soleiðis at vit framhaldandi kunnu røkja nakrar av fremstu uppgávum okkara sum eru; at framsýna føroyska og útlendska list heima og at fyrireika framsýningar av føroyskari list uttanfyri Føroyar. Harafturat at fylgja við og keypa føroyska nútíðarlist, so at vit ikki um nøkur ár hava manglar í okkara savni.
Tó hava vit í hesum roknskaparári fingið annan stuðul frá stovnum, grunnum og feløgum,  kr. 380.000, til framsýningar og konservering av listaverkum.

## 1.1 Listasavn Føroya og framtíðin

Bert tvey størv hava verið á Listasavni Føroya; fyribils setti savnsleiðarin og eitt savnshjálparfólk. Stýrið ásannaði, at við tí økta virkseminum á savninum var vónleyst hjá bert tveimum starvsfólkum at røkja arbeiðið til lítar. Ein avleiðing var, at nógv neyðugt arbeiði, sum viðtøkurnar áleggja stýrinum og leiðsluni, var ikki gjørt, tí verandi arbeiðsorka megnaði ikki alt. Tí hevur verið arbeitt við at bøta um verandi støðu, at fáa eitt starvsfólk afturat.
Várið 2004 var søkt eftir savnsleiðara og einum listfrøðingi. Mathea Hilduberg var sett sum savnsleiðari frá 1. juli og Inger Smærup Sørensen sum listfrøðingur frá 1.august.

LF er tjóðlistasavn Føroya, sum ber í sær stóra ábyrgd. LF skal savna tað besta í føroyskari list, skráseta, varðveita, granska og kunna. Hesar fimm uppgávurnar í savnsarbeiðinum gera LF til ein stovn, sum gevur føroyingum betri vitan og fatan av mentanararvinum. Úteftir gevur LF Føroyum eitt týdningarmikið mentanarligt andlit, og tað hevur tí týdning,  at LF verður ment eisini sum ein  fyritøka.

Við nýggju skipanini við trimum starvsfólkum helt stýrið, at arbeiðsviðurskiftini vóru loyst, so at tann stóra uppgávan og ábyrgdin, sum LF hevur, var í góðum hondum.
Longu 1. oktober segði savnsleiðarin seg úr starvi, og nú var støðan tann sama sum áður. Stýrið avgjørdi at lýsa eftir savnsleiðara aftur. Fýra umsóknir komu til starvið, og setti stýrið eftir innstillan frá Felagnum Føroysk Myndlistafólk og Listafelag Føroya Helga Fossádal í starvið sum savnsleiðara frá 1. mars 2005.

## 1.2 Savnið

Tjóðlistasavnið hevur skyldu at ogna sær nýggj listaverk við tí fyri eyga at víðka savnið, soleiðis at tað er umboðandi fyri føroyska list.

LF søkti Mentamálaráðið um eina árliga játtan, sum er markað til keyp av føroyskari list Umsóknin var ikki játtað. Nýggj umsókn er send Mentamálaráðnum fyri fíggjarárið 2006.

Viðmerkjast skal, at áðrenn LF var gjørt til sjálvsognarstovn, fekk Føroya Listasavn eina árliga jattan av fíggjarlógini á 300.000 kr, sum var til keyp av føroyskari list. Tíverri datt hetta burtur, tá ið LF gjørdist sjálvsognarstovnur.

## 1.3 Skrásetingin

Skrásetingarátakið, sum var gjørt várið 2004, gav eitt gott úrslit, og fleiri horvnar myndir komu undan kavi. Men enn vænta fleiri myndir, og arbeiðið heldur áfram.

## 1.4 Varðveitslan

Varðveitslan er eitt høvuðsendamál hjá LF, og hon er sera týdningarmikil. Tann serkøna varðveitslan viðvíkjandi listaverkunum hjá LF tryggjar henda partin av føroyska mentanararvinum og er neyðug, so at hann ikki fer fyri skeytið.
Listasavn Føroya hevur gjørt avtalu við Fælleskonserveringen AROS í Århus um konservering og gjøgnumgongd av øllum myndasavninum og at leggja konserveringsætlan fyri konserveringina. Nógv verk eru í ringum standi, serliga verkini av Mikinesi. Men longu í ár hava vit fingið konserverað 20 verk.

## 1.5 Gransking

Sambært viðtøkunum hjá LF hevur savnið ábyrgd av, at granskað verður í føroyskari list. Sjóneyka eigur at verða sett á ávísar partar av stóra savninum hjá LF við tí fyri eyga, at granskað verður á hesum økinum.

## 1.6 Kunning

Í komandi árum eigur kunning at verða ógvuliga høgt raðfest. LF skal miða eftir, at samband er millum kunning og aðrar uppgávur hjá savninum, gransking íroknað. Endamálið við framsýningum, kunningartilfari, rundvísingum, undirvísing, workshops, internet, fyrilestrum o.ø. er at geva og kunna um eina fjølbroytta og skjalprógvaða mynd av føroyskari list og listasøgu.

LF skal verða við til at menna eina ríka barnamentan í Føroyum. Í hesum sambandi at seta á stovn eina skúlatænastu og eitt lærarakervi, møguliga í samstarvi við Tórshavnar Kommunu. Møguleiki er eisini at fáa í lag samstarv við Lærara- og Námsfrøðiskúlan. Umframt hetta er eitt krav til eitt nútíðar listasavn, at ein samvirkin (interaktiv) kunning verður ment á heimasíðu savnsins.

Í kunningarvirkseminum hoyrir eisini annað mentanarkunnandi arbeiði. LF skal miða eftir at verða eitt opið og livandi stað, sum bjóðar mentanarlig tiltøk av ymiskum slagi. Hetta kann gerast við stuðli úr grunnum og samstarvi við t.d. Listafelag Føroya, sum er stuðulsfelag hjá LF.

## 1.7 Framsýningar

LF skal gera savnið atkomuligt við framsýningum, sum eru grundarlagið undir kunningini. Við skiftandi framsýningum skal LF lýsa bæði tey almennu og serligu eyðkennini í føroyskari og týðandi altjóða listini. Seinastu nógvu árini hevur LF havt eitt ógvuliga fjølbroytt og livandi framsýningarvirksemi. Tað eigur kortini at verða umhugsað, um fyrimunir eru at hava færri skiftandi framsýningar, og afturfyri geva teimum framsýningum, vit fara at hava, betri sømdir.

Til hvørja framsýning kundi verið gjørt ókeypis kunningartilfar við framsýningarteksti og yvirlit yvir listaverkini. Harumframt átti at verið bæði prentað kunningartilfar og tekstir til heimasíðuna fyri teir ymisku móttakarabólkarnar.

Langtíðarætlan eigur at verða gjørd við listasøvn í øðrum londum um sínámillum samstarv um framsýningar á altjóða stigi.

## 1.8 Marknaðarføring

Komandi árini eigur marknaðarføring at verða raðfest ovarlaga. Gerast skal ein greining viðvíkjandi marknaðarføringini og langtíðarætlanini fyri at menna tilboðini og tænastuna.
Frameftir verður peningaupphædd av allari fíggjarætlanini sett til viks til marknaðarføring, soleiðis at LF verður sjónligt bæði heima og í øðrum londum, og tilboðini verða kend og nýtt av eini vaksandi vitjanarfjøld.
Samstarvsavtalur kunnu gerast við t.d. ferðamannastovur.

## 1.9 Heimasíðan

Heimasíðan hjá LF hevur ein týdningarmiklan leiklut hjá savninum úteftir. Heimasíðan eigur at endurskoðast og alla tíðina at gerast meira tíðarhóskandi.

## 1.10 Listasavnshandilin - kaffistovan - læna høli

Listasavnshandilin og kaffistovan eru partur av listasavnsvitjanini, og eiga tí at hava høgt støði. Orka skal leggjast í, at gera bæði listasavnshandilin og kaffistovuna meira tíðarhóskandi, so at tey vitjandi kunnu fáa góða tænastu. Listasavnshandilin og kaffistovan skulu geva inntøku, soleiðis at hesar inntøkur kunnu nýtast aðrastaðni í savnsvirkseminum; harafturat skulu tey verða við til at fáa fleiri vitjandi.

## 1.11 Trygdin

Arbeiðið at menna trygdarskipanirnar á LF skal raðfestast ovarlaga. Í hesum sambandi skal gerast ein trygdarfrágreiðing.

## 1.12 Útlán / innlán

LF skal eisini í framtíðini verða til reiðar at læna partar av listaverkum sínum til onnur listasøvn í sambandi við serframsýningar við teirri treyt, at tær vanligu trygdarskipaninar eru í lagi , og um LF ikki hevur tørv á teimum. Tá ið listaverk verða útlænt, skulu tey kannast av konservatori, sum ger eina støðufrágreiðing. Lánarin skal gjalda útreiðslurnar av hesum.

LF hevur lænt ein hóp av listaverkum til almennar stovnar, sum eitt árligt leigugjald verður goldið fyri. Í sambandi við ymiskar serframsýningar er ein fyritreyt, at til ber at læna listaverk frá einstaklingum, stovnum og frá øðrum listasøvnum.

## 1.13 Listaverk í varðveitslu

Bert listaverk, sum hava áhuga hjá LF, eiga at verða tikin í varðveitslu.
LF hevur í løtuni fleiri verk í varðveitslu hjá einstøkum savnarum. Fyri hesi listaverk og listaverk, sum í framtíðini verða varðveitt á LF, skal gerast ein lánisáttmáli, sum báðir partar skulu skriva undir. Tað skal bera til at siga upp varðveitslusáttmálan við ½ árs skotbrá. LF teknar trygging fyri listaverkini í varðveitslu í varðveitslutíðarskeiðinum. LF kann nýta listaverk í varðveitslu í framsýningarhøpi.
Listaverk í varðveitslu skulu í framtíðini skrásetast í einum sjálvstøðugum parti av databasuni hjá LF

## 1.14 Skjalagoymslan

Tað verður í komandi ári arbeitt við skjalatilfarinum, sum er á savninum, so tað verður rætt skrásett, flokkað og goymt. Viðvíkjandi hesum arbeiði eigur møguleikin at fáa samstarv við Landsskjalasavnið at kannast.

## 1.15 Bókasavnið

LF eigur eitt stórt savn av listabókum, handbókum og framsýningarritum. LF hevur avtalu við Føroya Landsbókasavn, sum ger tað møguligt, at almenningurin kann læna bøkur úr savninum hjá LF.
Í framtíðini eigur at verða mett um, um LF kann hava gagn av sjálvt at umsita bókasavnið og á tann hátt draga til sín fleiri vitjandi.

## 1.16 Stuðul og fíggjarvánir

Stuðulin frá myndugleikum, grunnum og feløgum hevur stóran týdning fyri virksemi hjá LF, og tað hevur gjørt tað møguligt, at fremja tiltøk sum annars ikki vórðu gjørd.
Í hesum sambandi takkar LF Mentamálaráðnum, Tórshavnar Kommuna, Listafelag Føroya, Augustinusfonden, Beckettfonden, Reyni Service, Dansk Færøsk Kulturfond og Dronning Margrethe og Prins Hendriks fond fyri vælvild í árinum.

# Virkisgrundarlag og endamál

## 2.1 Navnið á savninum

LISTASAVN FØROYA

## 2.2 Adressa, telefonnummar o.t.

Gundadalsvegur 9, Postboks 1141, FO 110 Tórshavn
Tlf.: +298 313579. Fax: +298 316679
E-mail: info@art.fo
Heimasíða: www.art.fo

## 2.3 Savnsbygnaður

Listasavn Føroya er sjálvsognarstovnur, sum er stovnaður av Listafelagi Føroya og Føroya Listasavni í 1989, sum fevnir um framsýningarhúsið "Listaskálin", aðrar fastar ognir og savnið við føroyskari list.

## 2.4 Endamálið hjá Listasavni Føroya

- at keypa og á annan hátt fáa til vegar savn við listaverkum, undir hesum mynd- og gagnlist og at skráseta og varðveita hetta savnið.
- at sýna fram føroyska myndlist við fastari framsýning í Listaskálanum og at skipa fyri skiftandi framsýningum av føroyskari og útlendskari list í Føroyum og uttanlands.
- at útvega yvirlit yvir føroyska list á øðrum hondum.
- at fáa til vegar bókasavn, sum lýsir føroyska list og menning hennara.
- at veita skúlum, feløgum og øðrum vegleiðing og hjálp at lýsa føroyska list.
- at virka fyri, at stovnurin fjølgar um virkismøguleikarnar hjá skapandi listini.
- Listasavn Føroya kann lata almennum stovnum o.t. listaverk í varðveitslu við treytum, sum stýrið ásetur.

## 2.5 Samstarvsavtalur

Listasavnið hevur eitt sera neyvt samstarv við Listafelag Føroya, sum m.a. er stuðulsfelag hjá savninum, og sum á hvørjum ári fyrireikar Ólavsøkuframsýningina. Listasavnið hevur samstarv við Føroysk Myndlistafólk, sum m.a. fyrireika ta árligu "Várframsýningina".
Savnið samstarvar við Fælleskonserveringen (Vest) í Århus, tá tørvur er á konservering.
Avtalað er gjørd við Føroya Landsbókasavn um at skráseta og røkja listabókasavnið á Listasavninum.

# Innsavning, keyp og gávur

## 3.1 Listasavnið

Listasavn Føroya eigur u.l. 2000 listaverk (málningar, tekningar, vatnlitsmyndir, pastell, standmyndir, grafikk og steinprent). Hetta eru listaverk eftir føroysk listafólk ella listafólk við neyvum sambandi við Føroyar.

## 3.2 Keypt, givin og latin í varðveitslu

### Keyp:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kári Svensson | Hugbirting | kr. | 20.000 |
| Øssur Johannesen | | kr. | 5.000 |
| Frida Zachariassen | 7. málningar | kr. | 3.875 |
| Edvard Fuglø | Krákuting | kr. | 15.000 |
| Øssur Mohr | Glottar | kr. | 1.000 |
| Øssur Mohr | Glottar | kr. | 1.000 |
| Åse Bømler Olsen | 4 grafiskar myndir | kr. | 4.000 |
| Frits Johannesen | | kr. | 4.500 |
| Astri Luihn | Váðalogi | kr. | 15.000 |
| Astri Luihn | Váðalogi | kr. | 15.000 |
| Janus Kamban | Bronza Elinborg | kr. | 14.000 |

# Savnið, goymslan og bókasavnið

## 4.1 Útlánt listaverk

Til almennu stovnarnar, sum nevndir eru niðanfyri hava vit lænt út nøkur av okkara listaverkum:

| | |
|---|---|
| Almannaráðið | 25 |
| Arbeiðsloysisskipanina | 6 |
| Bárð Jákupsson | 1 |
| Bileftirlit Føroya | 5 |
| Danmarkar | 16 |
| Deildina fyri Arbeiðs- og Almanna Heilsu | 4 |
| Familju- og Heilsumálaráðið | 21 |
| Ferðaráð Føroya | 2 |
| Fíggjarmálaráðið | 23 |
| Fiskimálaráðið | 32 |
| Fiskiransóknarstovuna | 5 |
| Føroya Fólkaháskúla | 1 |
| Føroya Fornminnisavn | 2 |
| Føroya Gjaldstovu | 5 |
| Føroya Kærustovn | 11 |
| Føroya Landfúta | 3 |
| Føroya Landsskjalasavn | 6 |
| Føroysku Sendistovuna í Keypmannahavn | 3 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 1 |
| Gamla Apotekið / Løgtingsskrivstovuna | 8 |
| Granskingarráðið | 6 |
| Hvíldarheimið Naina | 10 |
| Landsbanki Føroya | 17 |
| Landsgrannskoðaran | 7 |
| Landssjúkrahúsið (Røntgendeildina) | 14 |
| Landsverkfrøðingin | 5 |
| Løgtingsskrivstovuna | 27 |
| Menningarstovuna | 5 |
| Mentamálaráðið | 6 |
| Oljumálaráðið | 8 |
| Postverk Føroya | 6 |
| Sjónvarp Føroya | 8 |
| Sorinskrivaran | 2 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 |
| Studentaskúlan & HF-Skeiði í Eysturoy | 4 |
| Tinganes | 63 |
| Tórshavnar Býráð | 3 |
| Tryggingarfelagið | 4 |
| Vinnuframagrunnin | 2 |

# Varðveiting og skráseting

## 5.1 Skráseting

Arbeiðið at skráseta egin listaverk á teldutøku skrásetingarskipanini er komið væl ávegis og heldur áfram.

## 5.2 Konservering

Fælleskonservering í Århus er samstarvsfelagi okkara í konserveringsmálum og í ár eru fylgjandi verk av S. J. Mikinesi konserverað.

- Í Mykines bygd, regn. 1934, 57 x 65 cm
- Undirlýsi 1938,57 x 74 cm
- Fólk við havið. 1944, 89 x 96 cm
- Grindadráp 1942, 176 x 233 cm
- Morgunsól. 1946, 61 x 78 cm
- Súgur við lendingina 1952, 100 x 125 cm
- Norðan 1957, 100 x 155 cm
- Kumlagrynnan brýtur 1959, 102 x 128 cm
- Á deyðastrá 1933, 20 x 26 cm
- Mykineskona. 1934, 54 x 42 cm
- Morgun. 1939, 100 x 135 cm
- Skipini fara 1937-38, 113 x 143 cm
- Dansur 1944, 144 x 194 cm
- Kvøld í Mykinesi, 1950, 80 x 89 cm
- Postbáturin. 1955, 110 x 150 cm
- Vetrarmorgun 1958, 105 x 120 cm
- Á deyðastrá. 1933, 20 x 26 cm
- Fyri jarðarferð 1935, 187,2 x 228,7 cm
- Eftir jarðarferð 235 x 175 cm
- Grindadráp 1960, 171 x 206 cm

# Kunning

## 6.1 Fasta framsýningin

### Upplatingartíðir:

| **1. juni - 31. aug:** | **1. sept. - 31. mai:** | **Opið er ikki:** |
|---|---|---|
| Mánad. - fríggjad. Kl. 11-17 | Týsd. - fríggjd. Kl. 14-17 | Páskadag |
| Leygd. – sunnud. Kl. 14-18 | Leygd. - sunnud. Kl. 14-18 | Hvítusunnudag |
| | Mánadag ikki opið | Skeiðið 15/12 - 15/1 |

Savnið er opið umleið 1300 tímar árliga.

## 6.2 Skiftandi framsýningar

30. januar - 22. februar 2004 - Kári Svensson - Hugbirtingar - Serframsýning

06. mars - 28. mars 2004 - Várframsýningin 2004 - hjá Føroyskum Myndlistafólkum

02. apríl - 16. mai 2004 - Frits Johannesen - Serframsýning

27. mai - 18. juli 2004 - Astri Luihn - Tað søgdu mær VILLINI FUGLAR - Serframsýning 2004

28. juli - 01. august 2004 - Ólavsøkuframsýningin 2004 - hjá Listafelag Føroya

06. august - 12. september 2004 - Øssur Mohr - Glottar - Serframsýning (Listarstevnan) PDF av bókini "Glottar"

04. september - 17. oktober 2004 - Framsýning - Egin listaverk

29. oktober - 19. desembur 2004 - Oluf Høst - Serframsýning

## 6.3 Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi

Tað hava verið 12.122 vitjandi; av hesum eru skúlar o.t. um 4.575 vitjandi

Nógvar rundvísingar hava verið fyri felagsskapir, ferðafólkabólkar, skúlar, útlendskar gestir hjá landsstýrinum og løgtinginum og øðrum, bæði í vanligu upplatingartíðini og eisini fyri og eftir vanliga upplatingartíð.

# Bygnaður, leiðsla og starvsfólk

## 7.1 Stýrið

Savnið hevur eitt stýri við 4 limum.
Mentamálaráðharrin velur ein lim, sum er formaður, og Tórshavnar Kommuna, Listafelag Føroya og Føroysk Myndlistafólk velja hvør sín lim. Fyri hvønn limin verður samstundis valdur ein tiltakslimur. Nevndin verður vald fyri eitt 4-ára skeið. Valskeiðið gongur frá 1. apríl til 31. mars eftir kommunuval. Stýrið velur varaformann. Fær formaðurin forfall, tekur varaformaðurin formanssætið.

Niðanfyri sótu í stýrinum til 31. mars 2005, tó segði formaðurin seg frá 1. mars 2005.

| | |
|---|---|
| Formaður: | Gunnar Hoydal, valdur av Mentamálaráðharranum |
| Nevndarlimur: | Heðin Mortensen, valdur av Tórshavnar Kommunu - Bjarti Mohr, varalimur. |
| Nevndarlimur: | Helgi Fossádal, valdur av Listafelagi Føroya - Malan Marnersdóttir, varalimur |
| Nevndarlimur: | Astri Luihn, vald av Føroysk Myndlistafólk |

Niðanfyri vórðu vald í stýrið fyri eitt 4 ára skeið frá 1. apríl 2005 til 31. mars 2009.

| | |
|---|---|
| Formaður: | Jágvan Páll Lassen, valdur av Mentamálaráðharranum - Einar Waag, varalimur |
| Nevndarlimur: | Hildur Eyðunsdóttir, vald av Tórshavnar Kommunu – Katrin Dahl Jacobsen, varalimur. |
| Nevndarlimur: | Árni Winther, valdur av Listafelagi Føroya – Julianna Klett, varalimur |
| Nevndarlimur: | Sigrun Gunnarsdóttir Niclassen, vald av Føroysk Myndlistafólk – Astri Luihn, varalimur |

## 7.2 Leiðslan

Helgi Fossádal røkti starvið sum virkandi savnsleiðari frá 1. mai 2003 til 1. juli 2004. Várið 2004 søkti savnið eftir savnsleiðara og einum listfrøðingi, og Mathea Hilduberg var sett sum savnsleiðari frá 1. juli og Inger Smærup Sørensen sum listfrøðingur frá 1. august.
Nýggi savnsleiðarin valdi at fara úr starvinum 1. oktober, og setti stýrið listfrøðingin Inger Smærup Sørensen at røkja savnsleiðarastarvið fyribils, meðan søkt var av nýggjum eftir savnsleiðara.

## 7.3 Starvsfólk

### Leys hjálparfólk

Eftiransingarfólk: Helga Nattestad, Mortan Ólavson Vang, Maiken Poulsen og Ragnhild Højgaard

# 8.0 Fígging og roknskapur

Listasavn Føroya verður rikið við studningi á løgtingsfíggjarlógini, Tórshavnar Kommunu og kann eisini taka ímóti øðrum stuðli, veitingum og gávum. Harafturat kunnu takast atgongu- og leigugjøld, kantinurakstur og søla av lutum og øðrum, sum hava samband við virki savnsins.

## RAKSTRARROKNSKAPUR
**Sjálvsognarparturin**

| | | 2004 | *(t.kr.)* *2003* |
|---|---|---|---|
| **Mentanartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | | 149.296 | *123* |
| Myndasøla | | 246.150 | *281* |
| Framsýningarútreiðslur | | -113.489 | *-198* |
| | | **281.957** | ***206*** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla ........................................................................................ | | 251.817 | *268* |
| Keyp ........................................................................................ | | -127.640 | *-185* |
| Goymslubroyting ........................................................................ | | -41.400 | *-75* |
| | | **82.777** | ***8*** |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul ........................................................................................ | 1 | 380.000 | *329* |
| Leiguinntøkur frá grafiska verkstaðnum og leiðara verkstaðsins | | 48.000 | *48* |
| Leiguinntøkur, grannahúsini .................................................... | | 98.400 | *98* |
| Leiguinntøkur málningar o.a. .................................................... | 2 | 180.763 | *257* |
| | | **707.163** | ***732*** |
| Starvsfólkakostnaður ................................................................ | | **-1.612** | ***-237*** |
| **Úrslit av aktivitetum v.m.** ...................................................... | | **1.070.285** | ***709*** |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Listakeyp ................................................................................... | | -98.375 | *-221* |
| Konservering ............................................................................. | | -224.000 | *0* |
| Viðlíkahald, reingerð v.m. ....................................................... | | -11.070 | *-12* |
| Skrivstovuhald, porto v.m. ....................................................... | | -25.634 | *-18* |
| Bókhald ..................................................................................... | | 0 | *-13* |
| Keyp av smáamboðum ............................................................... | | -5.765 | *-1* |
| Ferðaútreiðslur og umboðan .................................................... | | -72.397 | *-6* |
| Annað ........................................................................................ | | -61.791 | *-16* |
| | | **-499.032** | ***-287*** |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar** ........................................... | | **571.253** | ***422*** |
| Rentuútreiðslur ......................................................................... | | -87 | *0* |
| Rentuinntøkur ........................................................................... | | 582 | *1* |
| | | **495** | ***1*** |
| **Ársúrslit** .................................................................................. | | **571.748** | ***423*** |
| **Stýrið mælir til, at ársúrslitið verður býtt soleiðis**: | | | |
| At flyta til næsta ár ................................................................... | | -208.252 | *-107* |
| At flyta til millumverandi við Føroya Gjaldstovu .................... | | 780.000 | *530* |
| | | **571.748** | ***423*** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| **AKTIV** | | **2004** | *(t.kr.)* ***2003*** |
|---|---|---|---|
| Málningar ........ | 3 | 15.603.475 | *15.505* |
| Innbúgv ........ | | 295.354 | *295* |
| Listaskálin, 1994 ........ | | 18.614.366 | *18.615* |
| | | **34.513.195** | ***34.415*** |
| Bygningur, matr. nr. 1265v, Tórshavn ........ | | **899.800** | ***900*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** ........ | | **35.412.995** | ***35.315*** |
| Kassapeningur ........ | | 2.000 | *2* |
| Postgiro ........ | | 2.435 | *0* |
| Føroya Banki ........ | | 609.159 | *734* |
| Føroya Sparikassi ........ | | 75.216 | *64* |
| Gjaldskort ávegis ........ | | 1.640 | *0* |
| **Tøkur peningur íalt** ........ | | **690.450** | ***800*** |
| **Goymsla** ........ | | **200.000** | ***241*** |
| Skuldarar ........ | | 81.443 | *156* |
| Depositum ........ | | 0 | *224* |
| MVG ........ | | 0 | *6* |
| **Áogn íalt** ........ | | **81.443** | ***386*** |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** ........ | | **971.893** | ***1.427*** |
| **AKTIV ÍALT** ........ | | **36.384.888** | ***36.742*** |

**Veðseting:**

Matr. nr. 1265v, Tórshavn:

| | |
|---|---|
| Føroya Sparikassi ........ | 641.978 |
| Føroya Sparikassi ........ | 800.000 |
| | **1.441.978** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| PASSIV | Nota | 2004 | (t.kr.) 2003 |
|---|---|---|---|
| Saldo primo ............................................................................. | | 35.257.987 | *19.719* |
| Listaverk sambært uppgerð....................................................... | | 0 | *15.284* |
| Keyp av listaverkum í árinum................................................... | | 98.375 | *221* |
| Føroya Gjaldstova, avdráttir .................................................... | | 140.351 | *141* |
| Flutt frá rakstri ......................................................................... | | -208.252 | *-107* |
| **Eginogn ultimo** ...................................................................... | | **35.288.461** | ***35.258*** |
| **Lán viðv. matr. nr. 1265v í Tórshavn:** | | | |
| Føroya Sparikassi 267.584.8 | | 169.886 | *252* |
| Føroya Sparikassi 281.933.5 | | 501.795 | *560* |
| **Lán íalt** | | **671.681** | ***812*** |
| Føroya Gjaldstova (ársúrslit) | 4 | 415.000 | *530* |
| Ognarar | | 8.400 | *129* |
| Skyldugt mvg | | 1.346 | *0* |
| Giro | | 0 | *1* |
| Onnur skuld | | 0 | *12* |
| **Skuld íalt** | | **424.746** | ***672*** |
| **PASSIV ÍALT** | | **36.384.888** | ***36.742*** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | | 2004 | *(t.kr.)* *2003* |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Stuðul** | | |
| | **Framsýningar:** | | |
| | Mentamálaráðið - Varðveitan av mentanararvi | 0 | *60* |
| | Augustinusfonden | 25.000 | *0* |
| | Listafelagið | 25.000 | *0* |
| | Reyni Service | 25.000 | *0* |
| | Dronning Margrethe og Prins Hendriks fond | 25.000 | *0* |
| | Dansk – Færøsk Kulturfond | 0 | *5* |
| | **Konservering:** | | |
| | Mentamálaráðið | 100.000 | *0* |
| | Augustinusfonden | 80.000 | *0* |
| | Beckettfonden | 50.000 | *0* |
| | **Stuðul til trappulift:** | | |
| | Jólamerkjagrunnurin | 0 | *45* |
| | Listafelagið | 0 | *54* |
| | Happadrátturin | 0 | *90* |
| | **Árligur stuðul:** | | |
| | Tórshavnar býráð | 50.000 | *75* |
| | **Saldo ultimo** | **380.000** | ***329*** |
| **2.** | **Leiguinntøkur málningar o.a.** | | |
| | Leiga Skálin til tiltøk | 3.300 | *19* |
| | Leiga til móttøkur o.l. | 12.823 | *5* |
| | Leiga – List og málningar | 164.640 | *233* |
| | **Saldo ultimo** | **180.763** | ***257*** |
| **3.** | **Málningar** | | |
| | Saldo primo | 15.505.100 | *0* |
| | Listaverk smb. uppgerð | 0 | *15.284* |
| | Keypt í árinum | 98.375 | *221* |
| | **Saldo ultimo** | **15.603.475** | ***15.505*** |

**<u>Keypt í árinum:</u>**

| **Listafólk:** | **Prísur:** |
|---|---|
| Kári Svensson | 20.000 |
| Øssur Johannesen | 5.000 |
| Frida Zachariassen | 3.875 |
| Edvard Fuglø | 15.000 |
| Øssur Mohr | 2.000 |
| Aase Bømler Olsen | 4.000 |
| Frits Johannesen | 4.500 |
| Astri Luihn | 30.000 |
| Janus Kamban, bronza Elinborg | 14.000 |
| **Í alt** | **98.375** |

| | | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|
| **4.** | **Føroya Gjaldstova** | | |
| | Saldo primo | 530.000 | *127* |
| | Flutt úrslit | 780.000 | *530* |
| | Goldið í árinum | -895.000 | *-127* |
| | **Saldo ultimo** | **415.000** | ***530*** |

# Samanseting av tí almenna og sjálvseigandi ársroknskapunum 2004

| | Sjálvseigandi | Almennur | Samlað |
|---|---|---|---|
| **Mentanartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | 149.296 | 0 | 149.296 |
| Myndasøla | 246.150 | 0 | 246.150 |
| Framsýningarútreiðslur | -113.489 | -42.924 | -156.413 |
| | **281.957** | **-42.924** | **239.033** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla | 251.817 | 0 | 251.817 |
| Keyp | -127.640 | 0 | -127.640 |
| Goymslubroyting | -41.400 | 0 | -41.400 |
| | **82.777** | **0** | **82.777** |
| **Grafiskur verkstaður:** | | | |
| Leiguinntøkur grafiskur verkstaður | 48.000 | 0 | 48.000 |
| Útreiðslur grafiskur verkstaður | 0 | 0 | 0 |
| | **48.000** | **0** | **48.000** |
| | | | |
| **Úrslit av aktivitetum v.m.** | **412.734** | **-42.924** | **369.810** |
| | | | |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul/Játtan | 380.000 | 1.917.289 | 2.297.289 |
| Leiguinntøkur grannahúsini | 98.400 | 0 | 98.400 |
| Leiguinntøkur list | 164.640 | 0 | 164.640 |
| Leiga til receptiónir | 12.823 | 0 | 12.823 |
| Leiga Skálan út til tiltøk | 3.300 | 0 | 3.300 |
| | **659.163** | **1.917.289** | **2.576.452** |
| **Fyrisitingarútreiðslur:** | | | |
| Fast lønt | 0 | -988.712 | -988.712 |
| Tímalønt | 0 | -33.680 | -33.680 |
| Samsýningar, viðbøtur og arb.gjøld v.m. | -1.612 | -218.252 | -219.864 |
| El-útreiðslur | 0 | -109.731 | -109.731 |
| Hitaútreiðslur | 0 | -101.207 | -101.207 |
| Olja til maskinur o.a. | 0 | -42.294 | -42.294 |
| Telefon | 0 | -46.659 | -46.659 |
| Edv v.m. | 0 | -188.830 | -188.830 |
| Roknskaparhjálp og grannskoðan | 0 | -62.000 | -62.000 |
| Trygging | 0 | -40.372 | -40.372 |
| Vaktartænasta | 0 | -19.977 | -19.977 |
| Viðlíkahald, reingerð v.m. | -11.070 | -413.139 | -424.209 |
| Skrivstovuhald, porto v.m. | -25.634 | -89.597 | -115.231 |
| Keyp av smáamboðum | -5.765 | -28.952 | -34.717 |
| Ferðaútreiðslur og umboðan | -72.397 | -16.337 | -88.734 |
| Annað | -61.791 | -16.761 | -78.552 |
| | **-178.269** | **-2.416.499** | **-2.594.769** |
| **Aðrar útreiðslur:** | | | |
| Listakeyp, konservering o.a. | -322.375 | -54.266 | -376.641 |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | 0 | 0 |
| | **-322.375** | **-54.266** | **-376.641** |
| | | | |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar** | **571.253** | **-596.400** | **-25.148** |
| | | | |
| Fíggjarligar inntøkur | 582 | 0 | 582 |
| Fíggjarligar útreiðslur | -87 | 0 | -87 |
| | **495** | **0** | **495** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Úrslit** | **571.748** | **-596.400** | **-24.653** |

*Framhald á næstu síðu*

| | | |
|---|---|---|
| partur av úrsliti flutt frá sjálvseigandi til almenna uppgerð | -780.000 | 780.000 |
| Lánsgjøld | 0 | -183.600 |
| | -208.252 | 0 |

Uppskot til ársfrágreiðingina er løgd fyri stýrið á Listasavni Føroya

Tórshavn, 13. 11. 2005

**Helgi Fossádal**